


*Í Kunoy vitjaðu drotningahjúnini ta gomlu, men ístandsettu mylluna í Myllá. Her fingu tey sjón fyri søgn, at tað ber til at mala korn á kvørn við vatnorku*

# – VIT VERÐA SKJÓT AFTUR

**DROTNINGAVITJANIN** Seinnapartin í gjár fóru drotningahjúnini úr Føroyum, eftir eina vitjan, sum vardi í fimm dagar. Margretha drotning lovaði, at tað fara ikki ganga fimm ár, til tey koma aftur higar at vitja. - Nei, tað skal ikki verða so leingi til næstu ferð. Vit bæði eldast jú, segði hon brosandi á tíðindafundi í Bø í gjár, ein hálvan tíma áðrenn fráferð teirra

Snorri Brend

*Myndir: Jens Kristian Vang*

- Vit hava havt eina serstakliga góða vitjan her í Føroyum. Alt hevur verið so gott, og tí kann eg ikki velja nakað burtur úr, sum var betri enn hitt, segði Margretha drotning á tíðindafundinum.

Skilligt var, at tey ið hava fyrireikað vitjanina hava gjørt eitt framúr gott arbeiði. Tí, sum Margretha tók til:

- Hvør dagur hevur verið á tremur við góðum upplivingum.

- Tað hevur eisini verið ein gleði og tað hevur somuleiðis verið stuttligt at síggja, hvussu føroyska samfelagið hevur ment seg, hóast alheims kreppuna, segði hon, og legði í sama andadrátti aftrat:

- Hetta er ikki sama samfelag sum fyri 20 árum síðani, tá kreppa eisini herjaði her. Í dag hyggja fólk upp og tey hyggja eisini frameftir, legði hon dent á.

Drotningahjúnini harmaðust um, at tey ikki kundu vitja í Stóru Dímun og Skúvoy í gjár, orsakað av vánaligum veðurlíkindum. Tað verður so kanska næstu ferð ístaðin.

- Nær Frederik og Mary koma higar at vitja? Nei, tað kann eg ikki svara uppá. Tey eru ung og mugu sjálv avgera, nær tey koma, vísti Margretha á.

Eftir tíðindafundinum í gjár at døma fara tað ikki at ganga fimm ár, til tey aftur fara at vitja kring oyggjarnar. Tey vitjaðu her seinast í 2005.

## Beinini

Drotningahjúnini vóru mikudagin á vitjan í Norðoyggjum.

Beint áðrenn kl. 9 legði Dannebrog at við bryggju í Klaksvík, har almenn móttøka var.

Síðani gekk leiðin til Kunoyar, har tey fyrst heilsaðu uppá bygdaráðið í Kunoyar kommunu við John Damberg á odda.

Eftir móttøkuna vitjaðu tey ta gomlu, men ístandsettu mylluna í Myllá, sum